# Mastrahvalir í Vestmannasundi

*At mastrahvalurun er rovdjór tykjast bæði æður og teistar at hava sannað. Sunnudagin vóru seks mastrahvalir í Vestmannasundi*



*Summir av mastrahvalunum vóru so nær landi, at tú sást av vegnum beint niður á ryggin á teimum*
*Mynd: Edvard Joensen*

EDVARD JOENSEN

**Oyrargjógv:** Æður og teistar leikaðu sansaleys í, og grundin var sera sjónlig. Seks mastrahvalir komu spakuliga norður við Vágalandinum beint sunnan fyri ferjuleguna við Oyrargjógv.

Fólk, sum komu í land av Ternuni hendan sunnudgin fyrrapart, varnaðust hvalirnar tætt undir landi. Nógvir bilar steðgaðu, og fólk fór út at síggja hesa sjáldsomu sjón.

Og tó verður látið at í Vágum, at hon er kanska ikki so sjáldsom kortini. Tvær ferðir fyrr í summar hava mastrahvalir verið á Sandavági, og sandavágsmenn søgdu, at mastrahvalur eisini hendan sama sunnumorgun hevði verið inni á vágni.

Einaferð tíðliga í summar varð boðað frá grind í Sandavági. Men tá bátar komu til »grindina« vórðu teir varugir við, at hetta var mastrahvalur.

Fyri stuttum vóru seks mastrahvalir- ella bóghvítuhvalir - ella æðuhvalir - hvat ein nú velur at nevna teir - mestsum uppi á landi á sandinum í Sandavági. Teir vórðu riknir út aftur av alarunum á vágni.

Hendan vakra sunnumorgunin vóru seks hvalir á Sandavági, og aftur vóru alararnir á kroppinum á teimum, frættist úr Sandavági.

Fyrrapartin sunnudagin, tá blaðmaðurin saman við øðrum kom í land av Ternuni á Oyrargjógv, komu seks hvalir spakuliga norður við Vágalandinum. Fýra smærri og tveir størri hvalir vóru í bólkinum. Annar av teimum vaksnu var ivaleyst ein hannhvalur eftir stóra horninum at døma.

Hann svam soleiðis umleið eitt byrsumál úr landi. Spakuliga, eins og periskopið á einum kavbáti, sum kemur upp, kom hetta spíska hornið undan. Síðan sást ryggurin. Og uttan at nakað sást til, at hvalurin kúlaði seg saman, gleið fyrst ryggurin og síðan hornið spakulig undir aftur. Eftir var bert ein meldur í vatnsskorpuni, sum segði frá, at her var havsins størsta rovdjór rovdjór spakuliga farið glíðandi framvið.

Nærri landi vóru æður og teistar púra óð í høvdinum. Eingin ivi er um, at tey vita, hvat hesin hvalurin kann finna uppá, og tí royndu tey at bjarga sær, sum tey kundu best. Turnaðu eftir sjónum og royndu at sleppa á flog. Men tað eydnaðist bara onkrum, meðan onnur í villari angist lupu upp á land og tustu niðan gjøgnum fjøruna.

Og har, tætt fram við landinum, komu teir ungu jassarnir. Lívligir. Høvdu ivaleyst hug at spæla við hesar bebbaræddu fuglarnar. Hesir høvdu meira ferð, enn teir eldru ytri á. Komu tætt fram við landinum, so tað viðhvørt sá út, sum ætlaðu teir at gera landdgongd. Og ein teirra, var helst í serliga góðum hýri, tí hann slerdi við sveivinum, hvørja ferð, hann var undan. Líkasum ein heilsan til forvitan myndamannin, sum stóð við bilverjuna á vegnum beint sunnan fyri ferjuleguna og tók mynd niður á á ryggin á einum spælandi mastrahvali.

Men æðurnar tóktust tó sleppa við hvøkkinum hesaferð. Ternan bakkaði frá, og hvalirnir fóru eitt sindur yvir á Sundið og hildu leiðina norðureftir.

# Skjótt liðugt í Skopun

**Umbyggingin av ferjuleguni í Skopun verður liðug fyrsta dagin, og Tróndur sleppur so upp á pláss aftur**

Tróndur fer at sleppa »heim aftur« til vanligu ferjuleguna í Skopun um einar fjúrtan dagar ella so.

Arbeitt hevur verið upp á at umbyggja ferjuleguna í Skopun, soleiðis at hon kann brúkast til ta nýggju Sandoyarferjuna, sum er á veg. Meðan hetta arbeiðið hevur verið í gongd, hevur Tróndur lagt at undir flakavirkinum.

Hendan skipanin er partur í samlaðu umbyggingingunum av øllum ferjulegunum, sum nýggja ferjan fer at brúka. Í august varð arbeitt á Gomlurætt, og tá sigldi Tróndur til Havnar sum í gomlum døgum.

Av havnadeildini hjá Landsverkfrøðinginum verður sagt, at arbeiðið í Skopun væntandi verður liðugt um hálvan oktober, og tá kann Tróndur so flyta aftur í vanligu leguna.

**ej**



*Tróndur hevur ligið undir flakavirkinum, meðan arbeitt verður upp á ferjuleguna hinumegin*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Gjøgnum eld og vatn

*Í 67 ár hava sløkkiliðsmenninir í Havn verið borgarunum til hjálpar, tá okkurt hevur verið áfatt*

Sunnudagin 1. oktober varð føðingardagshald á Brandstøðini við Oyggjarvegin, har hátíðarhildið varð, at sløkkiliðsmenninir í Havn í 67 ár hava farið gjøgnum eld og vatn og upp í elstreyrar at hjálpa fólki, vilstum kettlingum og annars øðrum, sum hava trongt til eina hjálpandi hond.

Í samband við føðingardagin hevur Tórshavnar Sløkkilið tikið upp aftur eina gamla siðvenju, sum eisini verður brúkt aðrastaðni, nevniliga at heiðra sløkkiliðsmenn fyri drúgva og serliga tænastu.

Á Brandstøðini fingu fýra sløkkiliðsmenn heiðurstekin fyri at hava verið ávíst áramál í sløkkiliðnum.

Andreas Sjóvará fekk 20 ára heiðurstekin, meðan Heiðrikur Christiansen, Hans David Hansen og Peter Seloy fingu 10 ára tekin handað.



Peter Seloy hevur verið trý av árunum í sløkkiliðnum í Havn, meðan hann hini sjey hevur verið í Kalundborg.

Heiðurstekinini verða latin teimum, sum hava starvast í minst 10 ár sum kommunalir sløkkiliðsmenn.

Sagt verður av Brandstøðini við Oyggjarvegin, at tá Tórshavnar Sløkkilið um trý ár fyllir 70 ár, er ætlanin at gera eitt sindur meira burtur úr degnum.

Annars verður sagt av Brandstøðini, at í 1999 varð Tórshavnar Sløkkilið boðsent meria enn 1.000 ferðir.

**ej**



# Gríma aftur til brots

*Niðri á gamla meiðarínum rokast tey við at leggja seinastu hond á sjónleikin Krypilin úr Inishmaan. Eisini er skráin løgd fyri næsta leikárið fram til næsta summar, og nógv spennandi verður at gleða seg til*

STEFAN Í SKORINI

7. oktober ber til at seta seg væl til rættis á Meiarínum fyri at síggja nýggja leikin, sum Gríma hevur sett upp. Krypilin úr Inishmaan er ein kendur leikur, sum er skrivaður av 30 ára gamla Martin McDonagh. Hann er úr Onglandi, men av írskari ætt. Leikurin hevur verið vístur um alt Evropa og í Amerika. Eisini er hann sloppin framat í tjóðleikhúsinum í London. Martin McDonagh hevur latið sjey leikir úr hondum, og fleiri teirra hava verið virðisløn-arverdir.

Níggju leikarar eru við. Seks teirra eru limir í leikbólkinum Grímu, meðan hinir tríggir eru læntir áhugaleikarar. Leikararnir Ria Tórgarð, Birita Mohr, Egi Dam, Hans Tórgarð, Kristina Hansen og Páll Danielsen eru úr Grímu.



*Egi Dam, Adelborg Linklett og Jógvan Salomon Joensen venja her leikin Krypilin úr Inishmaan*
**Mynd: Jens Kr. Vang**

Umframt tey eru Hallur Hjalgrímsson úr Havn, Jógvan Salomon Joensen úr Gøtu og Adelborg Linklett úr Klaksvík eisini við.

Leikstjóri er Eyðun Johannesen, sum er komin heim til Føroyar fyri at vera. Umframt at leikstjórna leikinum tekur hann sær eisini av pallmyndini.

Leikurin fer fram í 1934, tá eitt lið at filmssjónleikarum kemur til lítla oyggjasamfelagið Aran vestanfyri Írland. Alt er á gosi av hesi forkunnugu vitjan. Leikurin rúmar beinrakið skemt, men er samstundis ein grípandi søga um foreldraleysa krypilin, sum býr hjá tveimum gomlum gentum. Leikurin er valdur, tí hann hevur bæði gaman og álvara.

– Leikurin minnir um tað føroyska veðurlagið, og hann broytist, sum ljósið broytist. Hann er bygdur upp sum eitt slag av eini kriminalsøgu. Beint sum áskoðarin heldur seg hava funnið útav tí, hendir okkurt nýtt, og so hevur tú ikki funnið útav tí hóast alt, sigur Eyðun Johannesen, leikstjóri um leikin.

– Eg gangi ikki til sjónleik. Tí skrivi eg leikir, sum eg kundi hugsa mær at sæð, um eg gekk til sjónleik, sigur maðurin aftanfyri leikin Martin McDonagh.

Umframt henda leikin, er ein annar leikur á skránni hetta leikárið. Miðskeiðis í mars mánaði næsta ár verður leikurin hjá Jóanesi Nielsen frumsýndur. »Eitur nakað land Week-end?« er heitið á leikinum. Leikritið vann leikritakappingina, sum Leikpallur Føroya skipaði fyri.

Teir á Meiarínum lótu ikki boðini sita á sær, men fingu hendur á leikinum og avgjørdu, at hann var verdur at seta upp.

– Hesin leikurin vísir nakrar síður, sum vit ikki hava sæð í skaldskapinum hjá Jóanesi fyrr, men tað er tó enn tann sami Jóanes, sigur Eyðun Johannesen, sum eisini skal leikstjórna tann leikin.

Leikararnir verða Egi Dam, Kristina Hansen, Birita Mohr, Katarina Nolsøe og Hans Tórgarð. Stamen Stanchev fer at skriva nýggjan tónleik til leikin.

### Jørgen-Frantz og Poul F

Umframt teir báðar stóru leikirnar verður nógv annað virksemi á Meiarínum, sum skal stytta fólki um tey longu vetrarkvøldini.

Tveir teir seinastu mánaðirnar í hesum árinum verður skipað fyri kvøldsetum fyri vaksnum á Gamla Meiarínum. Hetta eru frásøgukvøldini, sum næstan er vorðin fastur táttur. Í sambandi við at 100 ár eru síðani, at Jørgin-Frantz Jacobsen varð borin í heim, verður hansara skaldskapur eitt av evnunum. Eisini verður nomið við Poul F, og Birita Mohr og Hanus Johansen fara at lesa nakað av hansara skaldskapi.

Annars verður Nobelvinnarin Dario Fo eisini á skránni saman við frásagnum úr Havnini.

Umframt hetta eru tey so smátt farin undir at fyrireika eina jólakabarett, og Cafékvøld við upplestri, leikbrotum og tónleiki verða eisini á skránni í vetur. Av Gamla Meiarínum verður sagt, at hetta er eitt stað, sum er komið fyri at vera. Hetta er triðja árið, at Gríma húsast á Meiarínum.

Ein fastur fyrisitari er nú eisini settur í starv. Tað er Jenny C. Petersen. Hon hevur arbeitt innan sjónleik í Noregi í eini tíggju ár og hevur tískil tær neyðugu royndirnar.

# Kanna avleiðingar av vandamiklum evnum

*Í Norðurlandahúsinum sita 22 granskarar úr londum kring Norðpólin og gera metingar um tær upplýsingar, sum eru komnar fram viðvíkjandi vandamiklum evnum í fólki*

STEFAN Í SKORINI

Granskararnir hava allir tilknýti til AMAP, Arctic Monotoring an Assessment Program. Tað vóru ráðharrar úr londunum kring pólin, sum fyrst í nítiárunum eftir at jarntjaldið fall, tóku stig til at savna allar upplýsingar um dálking í póløkinum.

Londini vóru bangin fyri, at verri stóð til enn fólk grunaðu, og tí skuldi farast undir eina skipaða eftiransing av póløkinum.

AMAP er í ymsum bólkum. Tann, sum er í Norðurlandahúsinum hesar dagarnar, er Human Health Expert Group. Hann tekur sær mest av heilsuni hjá fólki, meðan aðrir bólkar fyrst og fremst fylgja við geislavirkni og veðurlagsbroytingum.

Póløkið er sera viðbrekið, har lítið er av vøkstri og djóralívið ikki er so fjølbroytt. Tí kann dálking gera størri skaða enn aðrastaðni á jørðini. Hetta ger tað neyðugt at fylgja væl við tí, sum fyriferst í økinum.

### Gott høvi

Pál Weihe umboðar Føroyar á fundinum, og er tað føroyska umboðið hjá Føroyum í AMAP. Hann heldur, at hetta er eitt sera gott høvi hjá føroyingum.

– Vit í Føroyum hava verið virkin innan heilsuøkið í fleiri ár. Hetta er tí eitt gott høvi hjá okkum í einum skipaðum forum at samanbera upplýsingar, sum eru fingnar til vega í øðrum londum, sigur Pál Weihe.

Til viðgerðar á fundinum verða mátingar av dálkandi evnum í menniskjum, sum búgva runt um Norðpólin, og hvørji skaðilig árin hesi evni kunnu hava á heilsuna hjá fólki.

Tann føroyski bólkurin fer til næsta fundin at leggja fram eina føðslukanning av barnakonum í Føroyum. Henda kanningin verður gjørd nú og verður væntandi klár at almannakunngera í vár, tá næsti fundurin er settur á skránna.

– Tað er týdningarmikið, at vit, sum liva og á markinum millum póløkið og evropeiska meginlandið, eru við í arbeiðnum at verja tey áhugamál, sum vit hava felags við onnur lond um okkara leiðir, sigur Pál Weihe.

– Hetta kann eisini brúkast seinni sum eitt politiskt argument móti teimum londunum, sum dálka mest og eru við til at hótta okkara lívsgrundarlag, men fyrst mugu vit staðfesta og prógva dálkingina, sigur Pál.

### Frágreiðing í 2002

Henda frágreiðingin, sum bólkurin er í gongd við nú, verður væntandi liðug og kemur út á prenti í 2002. Fyrsta frágreiðingin var liðug í 1996 og varð almannakunngjørd tvey ár seinni.

Seinastu árini eru russiskir granskarar komnir meira við í arbeiðið, og tað er ógvuliga týdningarmikið, tí ein stórur partur av økinum kring pólin er russiskt. Russland hevur altíð verið limur í AMAP, men hevur ikki verið miðvíst við frá byrjan.

Fundast varð 2. og 3. oktober, og luttakararnir fara av landinum mikudagin. Ferðalagið kom til Føroyar leygardagin, og sunnudagurin varð nýttur at síggja landið.

Teir 22 granskararnir eru úr Sibiria, Finnlandi, Svøríki, Noregi, Danmark, Føroyum, Íslandi, Kanada og Alaska.



*Granskarar eru í hesum døgum í Norðurlandahúsinum og meta um tey vandamiklu evnini, sum eru at finna í okkum, ið búgva kring Norðpólin  Mynd: Jens Kr. Vang*


Alt til seyming á einum stað

Sosialurin - 311820

Vit hava júst nú fingið ein hóp av nýggjari meturvøru, bæði til børn og vaksin. Nýggjasti móti til troyggjur, buksur, jakkar o.a.

Eisini hava vit fingið nýggj bond og annað at seta uppá klæðir.

Kom inn og síggj ella bið um prøvar.

SP/F MARJUN HEIMÁ

C. Ployensgøta 4 • 100 Tórshavn• Tel. 31 25 31 • Fax 31 23 19